**Jákup Mikkelsen**
**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmenn**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 31/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Avtaka uppboðssølu av fiskirættindum)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi

(Avtaka uppboðssølu av fiskirættindum)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 2018 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3 verður nr. 20 og 21 strikað.
Nr. 22 verður eftir hetta nr. 20.

**2.** Í § 5, stk. 1 verður "at bjóða upp á rættindi at veiða," strikað.

**3.** Í § 8, stk. 1 verður "at bjóða upp á rættindi at veiða," strikað.

**4.** § 10, stk. 7 verður strikað.
Stk. 8-12 verða eftir hetta stk.7-11.

**5.** Í § 12, stk. 3 verður ", um hesi rættindi ikki eru avhendað sambært § 42, stk. 2 ella § 43, stk. 3" strikað.

**6.** Í § 13, stk. 1, 1. pkt. verður "ið, ikki verða boðin út sambært §§ 14-18" strikað og í stk. 2 verður "ið ikki verða boðin út sambært §§ 14-18, og" strikað og í stk. 4, 1. pkt. verður "tó undantikið rættindi sambært §§ 14-18," strikað.

**7.** §§ 14-20 verða strikaðar.

**8.** Í § 21, stk.1, 1. pkt. verður "§§ 14-16, § 17, stk. 1 og 2, § 18, stk. 1 og stk. 3, 1.

pkt.,” strikað og í stk. 2, 1. pkt. verður “, undantiknar kvotur, ið eru bjóðaðar út á uppboðssølu,” strikað.

**9.** Í § 21, stk. 2 verður “§ 10, stk. 11” broytt til: “§ 10, stk. 10”.

**10.** Í § 23, stk. 4 verður “, og frádrigið tað, ið møguliga verður selt á uppboði, sambært § 14, § 17 ella § 18” strikað.

**11.** Í § 27, stk. 1, 1. pkt. verður “, og frádrigið tað, ið møguliga verður selt á uppboði, eftir ásetingunum í § 17, stk. 5 ella § 18, stk. 5” strikað.

**12.** Í § 30, stk. 1 verður “og fiskiførum, ið fiska av rættindum sambært §§ 17 og 18,” strikað.

**13.** Í § 34, stk. 2 verður “ ið ikki eru bodnir út á uppboði,” strikað.

**14.** Í § 39, stk. 4, 1. pkt. verður “§§ 14-18,” strikað.

**15.** Í § 41, stk. 3 verður “§§ 13-18, íroknað fiskidagar ella keyptar kvotur og” strikað og í stk. 6 verður “keyptum og” strikað og í stk. 7 verður ”, men er tó galdandi fyri rættindi keypt á uppboði sambært §§ 14-18” strikað.

**16.** § 42, stk. 2 verður strikað.
Stk. 3-5 verða eftir hetta stk. 2-4.

**17.** Í § 42, stk. 4, sum eftir hetta verður stk. 3 verður ”stk. 3” broytt til: ”stk. 2” og í stk. 5, sum eftir hetta verður stk. 4 verður “og 3” strikað.

**18.** § 43, stk. 3 verður strikað.
Stk. 4 verður eftir hetta stk. 3.

**19.** § 45 verður orðað soleiðis:
“**§ 45.** Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um og mannagongdir fyri, tá ov nógv veiða og hjáveiða, sum fiskifar ikki hevur rættindi at fiska, og hjáveiða annars hevur verið.”

**20.** § 50, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

**21.** Í § 81, stk. 1, nr. 1 verður “§ 10, stk. 1-3 og stk. 10” broytt til: “§ 10, stk. 1-3 og stk. 9” og “§ 42, stk. 1, 1. pkt., og stk. 2 og stk. 3, § 43, stk. 1 og 2” verður broytt til: ”§ 42, stk. 1, 1. pkt., stk. 2, § 43, stk. 1”.

**22.** Í § 81, stk. 2 verður “§ 19, stk. 7, § 20, stk. 2,” strikað og “§ 42, stk. 5” verður broytt til: ”§ 42, stk. 4” og ”§ 43, stk. 3,” verður strikað.

**23.** Í § 90, stk. 1, 2. pkt. verður ”§ 15, stk. 1, nr. 5 og 6, og stk. 2 galdandi fyri nr. 5 og 6,” strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**

Andstøðan hevur undir viðgerðini av uppskotinum hjá samgonguni um fyrisiting av sjófeingi víst á, at útlutan av veiðirættindum umvegis uppboðssølu skapar ótryggleika í vinnuni. So at siga øll vinnan gjørdi í hoyringarskrivum og undir hoyringum í Vinnunevndini vart við, at uppboðssøla av veiðirættindum er stórt afturstig í tí stóru menning, sum vit seinastu árini hava sæð í fiskivinnuni, síðani seinasta samgonga hækkaði uppsjóvarkvotupartin munandi.

Seinni hava royndirnar við uppboðssølu av fiskirættindum víst, at vinnan hevði rætt. Uppboðssølan hevur verið ein fiasko.

Trygg rættindi eru fyrsta treyt fyri eini skilagóðari tilrættislegging í øllum liðum í vinnuni. Ótryggleiki heldur vinnuni aftur at gera stórar íløgur í nýggj og framkomin skip. Ótryggleiki ger tað trupult at gera langtíðarsáttmálar, sum tá til stykkis kemur tryggja betri prís og trygg arbeiðspláss. Og ótryggleiki ger umstøðurnar at leggja framleiðslu við langtíðarperspektivum til rættis munandi verri.

Dømi um vánaligt úrslit av uppboðssølu eru nú fleiri. Í kappingini um at fáa hendur á rættindum gjørdist størsti parturin av rættindunum at veiða so dýrur, at skipini sótu eftir við halli. Eisini kann prísurin á veiðu broytast. Tá sildin varð seld á uppboðssølu í 2017, var prísurin á góðari leið. Men tá sildin kundi veiðast og síðani seljast, var prísurin í botni. Hetta lýsir greitt, hvørja støðu uppboðssølan kann seta tey í, sum dagliga skulu liva í vinnuni.

Uppskotið tekur av lógarmøguleikan hjá landsstýrismanninum at selja fiskirættindi á uppboðssølu.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Ásetingarnar um uppboðssølu av fiskirættindum verða strikaðar, umframt tillagingar og aðrar tekniskar broytingar í hesum sambandi.

**Til § 2**

Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi, 19. september 2018**

Jákup Mikkelsen Jørgen Niclasen